# Javnaðaruppskotið bøtir um avleiðingarnar

**Um alt gongur eftir ætlan kemur uppskot javnaðarflokksins um prís og vinnusteðg at bøta eitt sindur um tær verstu avleiðingarnar av toll- og avgjaldshækkingunum hjá samgonguni. Eisini um uppskot flokksins ikki verður viðtikið, tí samgongan er so sperd av hesum sama uppskoti, at hon noyðist at koma við einum lógaruppskoti, ið ber á sama borð sum uppskot javnaðarflokksins. Hendir nakað tílíkt, so merkir tað, at heilsølur og handlar ikki fáa lagt vinning oman á avgjaldshækkingarnar.**

**Løgmaður helt undir viðgerðini líti um ein prís og vinningssteðg, tí tað, sum hann segði, er ógjørligt at kontrollera søluliðini. Hetta boðar ikki júst frá stórum áliti til innflytarar. Hinvegin ganga javnaðarflokksins umboð í tí stóra og heila út frá, at kemur ein lóg um prís og vinningssteðg, ja so fara handlar, heilsølur og innflytarar sjálvandi at respektera eina slíka lóg. Hesir samfelagsbólkar eru sjálvsagt eins lóglýdnir og aðrir, meta tingmenn javnaðarflokksins, men tað gekk heilt klárt fram av málsviðgerðini, at løgmaður hevur ikki sama álit á landsins handilsfyritøkum.**

Uppskot javnaðarflokksins um prís og vinningsteðg hava skapt álvarsamar trupuleikar í samgonguni. Hetta kom fram undir aðru viðgerð av inntøkulógaruppskotum landstýrisins mánadagin.

Tá tað gjørdist greitt, at Hilmar Kass úr sjálvstýrisflokkinum fór at atkvøða fyri uppskotið Javnaðarflokksins, gjørdust Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen løgmaður, í luftini.

Agnar Nielsen segði, at stóð sjálvstýrisflokkurin fast við sítt, mátti hann krevja samgongufund áðrenn málið fór viðari.

Somuleiðis royndi løgmaður at lokka og hótta, men alt til einkis.

Hilmar Kass hevði verið ov munnlættur við fyrstu viðgerð, har hann hevði mutlað okkurt um vinningssteðg, at har vendist ikki aftur.

Síðan tók Olaf Olsen orðið, nevndi seg landstýrismann í haldilsmálum og segði, at hann júst sat og gjørdi eina lóg um vinningsteðg. Hon var ikki komin á papírið, men hon var í tonkunum. Síðan varð fundarslit og samgongumenn fóru lotir av fundinum.

### Lívligt orðaskifti

Frammanundan var farið fram eitt lívligt orðaskifti, har uppskotini hjá landstýrinum vórðu gjøgnumheglað av andstøðuni. Umboð javnaðarflokksins vístu á, at grundgevinarnar fyri toll og avgjaldshækkingunum yvirhøvur ikki hildu, men at tær vóru beinleiðis rangar og villleiðandi.

Javnaðarflokkurin førdi fram, at landsstýrið roynir at fáa tað at siggja út sum um fyrra samgongan hevur koyrt landið á húsagang. Tí kemur hendan samgongan og ætlar at figgja eitt vanligt figgjarlógarundirskot við eini umfatandi avgjalds- og tollløggávu. Hetta sjálvt um peningurin kemur inn tann dag tá skattaeftirstøðurnar eru innkomnar og við tað at 48 milliónir eru í yvirskoti á verandi figgjarlóg.

### Aftaná at sáttmálarnir eru gjørdir

Umboðini hjá javnaðarflokkinum vístu eisini inntøkulógaruppskotunum aftur út frá teimum grundgevingum, at tey fyri tað fyrsta komu aftan á, at fakfeløgini høvdu gjørt nýggjar lønarsáttmálar. Harnæst, at tey komu at raka pensionistar heilt órímiliga hart nú samgongan hevði noktað at hækkað fólka- og avlamispensiónirnar, so sum avtalað er við danir.

Eisini vístu menn úr andstøðuni á, at slík tiltøk ongan mun gjørdu, tá talan var um at hjálpa upp á búskaparligu kreppuna.

### Hægri gjøld óneyðug

Tað var heilt greitt av umrøðuni, at uppskotini um hægri gjøld eru óneyðug og harvið bæði ómoralsk og órættvís, tí eitt hall á landskassaroknskapinum er eingin vanlukka.

Eitt annað er so tað, at sjálvur landskassin hevur likviditetstrupuleikar í løtuni, men tað hevur hann havt fyrr, uttan at farið varð at gera nýggjar inntøkulógir.

Heldur kundi verðið lænt ella trekt upp á kredittin í danska tjóðbankanum til støðan batnar aftur, t.d. við at skatta-eftirstøðurnar so við og við ganga inn.

Men trupuleikin hjá Paula Ellefsen er tann, at hann hevur tosað so nógv um lántøku og leikað so í um lántøkur hjá øðrum, at hann nú ikki fær brúkt hetta heilt vanliga amboð í eini akuttari og stuttvarandi likviditetskreppu.

### Rangar og villeiðandi

Annars er innihaldið í áliti Javnaðarflokksins fylgjandi:

Minnilutin, Jørgen Thomsen fyri javnaðarflokkin, førir fram, at grundgevinarnar hjá landsstýrinum fyri inntøkulógaruppskotunum eru rangar og villleiðandi. T.d. verður sagt í viðmerkingunum, at tær inntøkur, sum landskassin fær av hesum lógum, skulu nýtast

Framhald á síðu 6

# Øll tey størstu fakfeløgini mótmæla

**Øll tey størstu fakfeløgini í landinum hava í skrivi til løgtingið mótmælt uppskotum landsstýrisins um inntøkulógir. Fakfeløgini eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnu- og -mannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnu- og -mannafelag, Meginfelag útróðrarmanna, sum øll hava undirskrivað mótmælið hjá FA. Føroya Fiskimannafelag og Aksturfelagið Samfylking hava eisini sent løgtinginum mótmælisskriv.**

Mótmælið FA's er soljóðandi:

Undirritaðu feløg skullu við hesum harðliga mótmæla, teimum uppskotum til inntøkulógur, sum Landsstýri hevur lagt fyri Løgtingið.

»Vit loyva okkum at vísa á, at vit, tá seinastu sáttmálasamráðingar vóru fyri, sýndi stóra ábyrgdarkenslu mótvegis teimum búskaparligu trupulleikunum í samfelagnum. Út frá hesi ábyrgdarkenslu góðtóku vit ein nógv minni lønarbata, enn tað sum vit upprunaliga kravdu. Somuleiðis góðtóku vit ein tvey ára sáttmála, og gjørdu harvið okkara til at skapa tryggari viðurskiftir á arbeiðsmarknaðinum. Seinasti sáttmálin var eisini góðtikin, í tí trúgv, at ongan álvarsamar broytingar fóru at verða gjørdar frá almennari síðu, sum kundu dýrka munandi um livikostnaðin hjá føroyska lønmótakaranum.

Vit loyva okkum tí at gera løgting og landsstýri varug við, at tann lønarbati, sum varð vunnin við seinasta sáttmála, heilt verður burtur beindur, um uppskot landsstýrisins verða samtykt.

Vit átala, at landsstýrið ætlar at fremja hesi uppskot í bráskundi, soleiðis at feløgini ikki hava høvið til at kanna allar tær avleiðingar, sum inntøkulógaruppskotini fara at fáa ávirkan okkara limir.«

Vit skulu tó loyva okkum at vísa á eitt dømi um hesar avleiðingar.

Hjá einum arbeiðara og handverkara gav seinastu sáttmálin, ið nýliga samtyktur varð, ein lønarbata á 2.325 kr. í miðal um árið.


Til samanberingar skullu vit vísa á, at bert toll- og bensin- hækkingarnar eftir uppskotið Landsstýrisins fara at kosta einum føroyskum húski í miðan 2.800 kr. um árið (lágt sett).

Tá afturat hesum verður haft í huga, at galdandi prístalsskipan ikki gevur lønarmótakaranum fult endurgjald fyri prísvøksturin, er niðurstøða okkara tann, at nevndu uppskot landsstýrisins fara at føra til eitt so stórt reallønarfall, at vit harðliga mugu mótmæla, at hesi uppskot verða samtykt«.

## Skúlaráðið:

# Nei til 4. og 5. flokk á Hvítanesi

Skúlin á Hvítanesi lúkar ikki tær treytir, sum verða settar til undirvísingarhøli til 4.—5. flokk. Skúlin hevur ongar serstovur. Hetta er orsøkin til, at skúlaráðið í Tórshavnar kommunu ikki kann viðmæla, at hesir báðir flokkarnir verða settir á stovn á Hvítanesi, soleiðis, sum foreldur har ynskja. Foreldrini á Hvítanesi og landsskúlaráðið fáa at vita um støðuna hjá skúlaráðnum, sigur formaður ráðsins, Johannes Álvheygg.



Foreldrini á Hvítanesi avgjørdu, áðrenn skúlaárið byrjaði, ikki at senda børn í skúlan í Hoyvík fyrr enn ynskið um 4.—5. flokk er gingið á møti. Tað er soleiðis, at børnini á Hvítanesi taka 1.—3. flokk á Hvítanesi. Síðani fara tey í Hoyvíkar skúla og haðani úr 7. flokki í Eysturskúlan. Fólkini á Hvítanesi vilja, at børnini skula fara úr 5. flokki á Hvítanesi beinleiðis til Havnar.

Eitt annað mál, sum vakti misnøgd á Hvítanesi, er avtøkan av skúlabarnakoyringini millum Hvítanes og Hoyvíkar skúla. Býráðið tók hana av í summar og spara harvið 30.000 kr. Henda spurning metir býráðið seg tó at hava loyst við at lata Bussleiðina koyra til Hvítanesar. Koyringin byrjaði fyrradagin.

**Skúlin á Hvítanesi kann ikki brúkast til 4. og 5. flokk, meinar skúlaráðið**



Fýra børn eru í skúlanum á Hvítanesi. Tey 11 børnini, sum í vetur skuldu ganga í Hoyvíkar skúla, fáa undirvísing heima við hús